DAGSINS MEINING

Almenni bygnaðurin og privatiseringar

Tað er ein sannroynd, at almenni bygnaðurin er størri í vavi og dýrari enn nakrantíð aftaná tveir borgarligar løgmenn. Eisini kann staðfestast, at ein stovnur sum Strandfaraskip Landsins hevur størri umsiting enn nakrantíð og hevur nógv størri raksrarútreiðslur einn nakrantíð - og tá er skotlandssiglingin íroknað. Postverkið ber ikki post út leygardag longur, og er tað eitt stórt afturstig, men tað er politiskt bestemmað av fólkaflokssamgonguni, at tænastustøðið skal lækka.

Hetta er ein trupulleiki og má bygnaðurin endurskoðast sum skjótast, tí óansæð hvussu dugnalig og ágrýtin starvfólkini eru, so kann ein ineffektivur og óliðiligur bygnaður køva allan framburð. Privatiseringsfortalarnir fáa tað alt ov lætt, um samanlíkningsgrundarlagið verður bygnaðurin í dag við tilhoyrandi høga kostnaðarstøði.

Privatisering hevur altíð verið eitt hjartamál hjá borgarligu flokkunum í Føroyum, og hava vit eisini dømi um slíkar privatiseringar og útlisiteringar. Yngra ættarliðið av embætisfólki og vinnulívsfólki hevur lyndi til at halda, at privatisering og útlisitering eru nýuppfunnin hugtøk, men so er ikki.

Telefonverkið útlisiteraði uppgávur longu fyrst í sjeytiárunum og royndir hava verið gjørdar við privatum lastbilum knýttum at almennu lastbilunum. Bussarnir sum Strandfaraskip Landsins rekur í dag vóru riknir privat áðrenn, men landið mátti sum ikki einaferð taka um endan og fekk tað vent til ein gevandi rakstur.

Man eigur ikki blankt at avvísa alla privatisering, men summar grundleggjandi tænastur mugu vera á almennum hondum.

Vit sóu hvat hendi við eitt nú privatum byggifyritøkum í 90'unum. Tær fóru burtur í einki, og einasti garantur fyri varðveitlsu av førleika var Landsverkfrøðingsstovnurin.

Tað er neyvan nakar skaði í at diskutera privatisering av eitt nú Føroya Tele og kanska enntá bankunum. Ein og hvør søla av landsins ognum má fara fram til rætta virðið. Tað má ikki vera ein privatisering, har privatu partabrøvin í Føroya Banka verða uppskrivaði, tí allir teir smáu partaeigarnir - Palliba - voru rundaðir niður til null fyri fáum árum síðani.

Vit kunnu hyggja at fyritøkunum hjá Føroya Grunninum, ið hava verið riknar væl í nógv ár - nógvir føroyingar vistu ikki, at landið átti hesar fyritøkur. Ein fyritøka kann rekast væl óansæð hvør eigur. Almennar fyritøkur nýtast ikki at vera ineffektivar og privatar eru ikki pr automatikk effektivar - ein eigur at minnist til tað, óansæð hvat man annars heldur um privatisering.

Sosialurin

Heilsan til Mallu á 100 ára degnum

Her er ein mynd av familjuni hjá Mallu. Sum tú sært situr hon undir liðini á abba, Johannusi Jacobsen, skómakar í Fuglafirði. Tey eru tey einastu eftir á lívi av systkjunum, sum vóru fimm, Magnina, Dia og Jákup Sigurð.

Uttast til høgru er John Reynbú, sum vaks upp hjá Mallu og Dánjal Martini. John er systursonur Dánjal Martins.

Annars eru hini børn hjá brøðrum hennara, abba sum hevði sjey (Jóna, Óli, Ninnema, Oddvør, Lena, Sigga, Osvald), Dia, sum hevði tvey børn (Karolina og Osvald) og Jákup Sigurð sum hevði fýra børn (Osvald, sum doyði ungur, Petur Andrew, Karolina og Jógvan Patur)

Hini á myndini eru abba-, langaabba- og oldurabbabørn hjá brøðrum hennara

Heiðursportur í Funning

Til Móðir mína

Veldugur vart tú Gud mín, tá himin og jørð vóru til,
tó ikki minni eg undrist, at tú gav mær vit og skil,
tú gavst mær oyru og eygu at skyna ljóð og lit,
tó skaparaverkið stóra ei skilir hitt bjartasta vit.

Í mikla mannaskara, eg eri bert lítið fon,
og tó var hon ei mín móðir, meg nevndi sín einkarson
við kærleika hon meg aldi og knýtti so fast at sær,
so tætt, at eg ei føldi, hon ikki mín móðir var.

Tí vil eg teg móðir kalla, ið móðirhjarta ber.
Tær móðir vil eg geva allan heiður, ið er
mín egna var tikin burtur so tíðliga, eg minnist tað ei,
og hennara gumma vart tú, so báðum tú fylgdi á leið.

Nú ert tú vorðin so gomul, tú náddi heila øld,
tú einsamøll hórar eftir úr miklari mannafjøld.
Hann, sum tær gav lív og evni so langan ein arbeiðsdag,
Hann verði í ferðini við tær til ytsta ægisvað.

John Reynbú

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Hví skundar býráðið sær at avreiða kommunal áhugamál á Argjum?

Regin av Steinum

Albert Halli, skuldi ganga fyri írestandi upphæddina. Argja kommuna (nú Tórshavnar kommuna) fekk ongantíð nakra gleði av hesum vælsignaða gosbaði, men rovini hava rikist uppi á Sandvíkahjalla til denna dag, um onkur skuldi verið áhugaður.

Nú lendið, sum Cepatrøðin var partur av, var upprunaliga landsjørð. Argja kommuna keypti tað frá Jarðargrunninum til byggilendi o.a. Eitt partafelag, Cepa, slapp at bøla oman á hesum meira enn 11. 000 m2 í áravís, men stykkið var annars ikki nomið. Kostnaðurin skuldi vera einar 620.000 kr. Felagið rindaði um helvtina, tá ið keypið kom í lag; restin av peninginum varð ongantíð goldin, men í staðin varð – nógv ár seinni - borið soleiðis í bandi, at eitt gosbað, ið stóð til fortreð í Hóast henda søla varð sera løgin, so vóru kortini ávísar treytir við søluni. Ein treytin var, at kommuna hevði rætt at fáa stykkið aftur fyri keypsprísin við rentum, sostatt hevur Tórshavnar kommuna veruliga nakað at halda um í hesum máli!

Tað undrunarverda er nú, at býráðið á fundi 26. apríl 2001 hevur samtykt at gera broyting í byggisamtyktini, og soleiðis vera eigaranum til vildar, nú tað ræður um at fáa sum mest burturúr.

Hví hevur hetta knappliga so stóran skund?

Fari hervið at heita á býráðið at taka málið upp av nýggjum og síggja málið við tí samlaðu búsetingini á Argjum í huga. Tað er bara hesin møguleikin til staðar eftir í bygdini at gera ein depil, miðstaðarøki, sum kann knýta alla bygdina natúrliga saman. Eingin er so blindur, at hann sær ikki henda møguleika!

Hús kunnu vera allastaðni, men skúlar, barnagarðar, læknahøli, ítróttahøll osfr. eiga at liggja so væl fyri sum gjørligt, og tí má Cepatrøðin ikki gleppa kommununi av hondum. Býráðið kann ikki rokna við at fáa bíligari jørð frá t.d. privatum eigarum á Argjum til almenn endamál. Í hesum sambandi hevði tað verið áhugavert at fingið at vitað, um býráðið hevur nakrar ítøkiligar útbyggingarætlanir á Argjum á sama hátt sum í øðrum pørtum av kommununi?

Eitt afturat: kommunan skal jú sjálv gera ringvegin fram við lendinum, og tann kostnaðurin eigur eisini at havast í huga.

Hvar er bygdarinnar umboð í hesum máli?

Uppskotið um "óhefta" nevnd er reindyrkað fasisma

Jóanes N. Dalsgaard

Fyri fáum vikum síðani ætlaði sitandi løgting at sníkja eina fullkomiliga órímiliga eftirlønarskipan ígjøgnum. Beint, sum hetta var um at eydnast, var ráðagerðin avdúkað. Straks fóru allir tinglimir til vaskifatið við hondum sínum. Summir tinglimir siga seg ikki vita hvat teir hava atkvøtt fyri. Aðrir siga lóggávuarbeiði vera so torskilt, at tey halda tað í sær sjálvum vera umbering fyri, at tey ikki hava skilt, hvat tey hava lóggivið um. Uppaftur onnur siga seg onga skuld hava, tí tey lótu vera við at atkvøða, tá málið var fyri í tinginum. Men sambært stýrisskipanarlógini telja einans tær atkvøður við, sum ljóða antin ja ella nei. Við øðrum orðum: Tann sum tegir samtykkir.

Hesin sjónleikur er í sjálvum sær margháttligur, komiskur ella tragiskur, alt eftir hvørjar brillur veljarin hevur sitandi á nøsini. Men aftanfyri hesar óvirðiligu kávalótir tingmanna og -kvinna stendur tann ógunniliga sannroynd, at varð ráðagerðin ikki avdúkað, hevði tað eydnast sitandi løgtingi at innføra eina fullkomiliga órímiliga eftirlønarskipan fyri landsstýrismenn. Eina eftirlønarskipan, sum hevði borið í sær, at ovurhonds peningavirði høvdu verið tikin úr lummanum hjá føroyskum løntakarum og pensionistum og løgd í lummarnar hjá longu vælbjargaðum politikarum.

Nú ráðagerðin er avdúkað, royna tingmenn og -kvinnur at "gera tað gott aftur". Havandi í huga tað fantastiska álitisbrot, sum tingið júst hevur framt ímóti Føroya fólkið, bar illa til at vænta, at umberingin til føroyska veljaran fór at vera serliga hjartalig. Men at umberingin skuldi vera enn ein ráðagerð, bert nógv ótýdligari enn hin fyrra, mundu fáir føroyingar duga at ímynda sær. Tann nýggja ráðagerðin er ein ætlan um at seta eina "óhefta" nevnd til, uttan um løgtingið, at áseta lønir og eftirlønir hjá løgtings- og landsstýrislimum.

Avgerandi fyri at eitt samfelag kann kallast demokratiskt er, at ovasti myndugleikin í samfelagnum er fólkavaldur. Føroyar kunnu kallast eitt demokratiskt samfelag, tí at Løgtingið, sum er ovasti myndugleiki í Føroyum, er fólkavalt. Men hetta vilja føroyskir politikarar nú broyta. Við at seta eina "óhefta" nevnd at áseta lønarviðurskiftini hjá løgtings- og landstýrislimum, fáa vit ein ikki-fólkavaldan myndugleika omanfyri Løgtingið. Verður uppskotið um at seta "óheftu" nevndina framt í verki er demokratiið prinsippielt avtikið í Føroyum. Vegurin liggur tá opin fyri at seta alskyns "óheftar" nevndir at avgera alskyns mál, sum í dag hoyra undir løgtingsins myndugleika. Vit kunnu vænta okkum "óheftar" nevndir, sum skulu áseta fólkapensión, kommunuskatt, játtan til sjúkrahúsverkið, spurningar um valrætt og valbæri, útnevna løgmann og so framvegis. Tílík "óheft" teknokratstýring er ikki bara ódemokratisk. Fyribrigdið, sum nevnist korporatisma, eykennir fasistisk diktatur!

Nú skal tað vera mær so óendaliga fjart, at skíra nakran ting- ella landsstýrislim at vera fasist. Men ein sannroynd er tað, at summi teirra fonglast í hesum døgum við nakrar av grundarsteinunum undir okkara demokratisku stýrisskipan í sovorðnan mun, at eitt fasistiskt stýrislag kann gerast endin. Men hvør uttan ein fasistur, vil arbeiða fyri einum fasistiskum stýrislag? Tað einasta svarið eg dugi at finna er, at tað er ein, sum ikki veit hvat hann/hon ger.

Í rættarskipan okkara er tað so, at eingin kann revsast fyri eina gerð, sum hann/hon fyri fávitsku ikki dugdi at síggja avleiðingarnar av. Eitt smábarn, sum spælir við eld, dugir ivaleyst illa at ímynda sær tann ræðuliga skaða, sum spælið kann gerast atvoldin til. Júst tí eiga vit ikki at lata smábørn spæla við eld! Á sama hátt mugu vit siga um teir politikarar, sum í hesum døgum spæla við demokratiska grundarlagið undir okkara samfelag, at teir ivaleyst ikki kunnu dragast til svars fyri tað teir gera, tí teir vita ikki hvat teir gera. Men júst tí eiga teir ikki at vera politikarar!

Samanumtikið hava vit seinastu dagarnar lært, at sitandi løgting er líka vandamikið fyri føroyska demokratiið, sum eitt smábarn við svávulpinnum er fyri eitt høyggjhús. Føroyingar hava tí eitt í at velja til tess at bjarga demokratinum í Føroyum. Tað er, at krevja nýval beinanvegin.

Færøyene

Om vær, farver og lys, og en mann med en leyp.

Willy R. Kastborg

Det er det samme landskap. Det er de samme marker, de samme fjell og det samme hav. Det er her alt sammen, men jeg ser det ikke. Jeg er i et stort grått, tomt intet.

Jeg tenker at Vårherres engler har hatt en travel natt med å veve det ugjennomtrengelige tåketeppe som vått og tungt omslutter himmel og jord på det sted jeg befinner meg.

Jeg hører heller ingen lyder. Ingen menneskestemmer, intet fuglekvidder, ikke den vante rytmiske dunkten fra båter på vei til feltene.

I dette øyeblikk i denne tidlige morgen er jeg utestengt fra verden, og verden fra meg.

Så endres det. Tåken letter. Skylaget revner. Jeg skimter en flik av en blå himmel, som langsomt vides ut. Marken omkring meg erobrer tilbake sin grønne farve. Det anger en duft av vått gress, og blomster, gule, hvite og røde. De er utallige i antall. Mens fjellene fremdeles er sorte silhuetter hvor detaljene ennå ikke er brutt ut av mørket, er gråstenene ikke lenger grå stener. I det demrende morgenlys har de et islett av rødligbrunt og mosegrønt.

Har jeg noengang sett himlen slik? En blå helhet er velvet over meg, hvor det lyseste lyseblå til det dypt svartblå veksler og glir over i hverandre som tråder i en vev. Havet nedenunder er en blå vannvei. Lengst ute rinner solen, og sprer sine varmt livgivende stråler. Som et eventyrlandskap trer landet frem for mine øyne.

Dette er Færøyene. Færøyene er vær, skiftende og uforutsigelig. Færøyene er farver, og lys. Intet sted er lyset så intens som her ute ved havet. Intet sted skaper lyset landskapet som her. Det landskap du bor og ferdes i, og tror du kjenner, er aldri det samme. Det omformes og nyskapes igjen og igjen av det alltid foranderlige lys.

Jeg elsker landets og landskapets uendelige skjønnhet. Men jeg vandrer ikke i det. Jeg er ingen beveger. Jeg er en betrakter.

Jeg er ikke alene. En tjaldur flyr hastig flaksende i retning bort fra meg. En hare sitter ved en stor, ruvende sten et par meter borte. Den ser nysgjerrig spørrende på meg. Jeg tar et skritt mot den. Den gjør et lite hopp tilbake. Jeg går enda et skritt frem. Den foretar et nytt tilbakehop. Og blir sittende. Den smiler grandgivelig av meg. Med travle forlabber begynner den å gjøre morgentoalett. Meg enser den ikke lenger. Jeg er plassert som det ufarlige vesen jeg vitterlig også er.

Jeg ler.

– Du har rett. Du har intet å frykte. Jeg er ingen jeger, og har intet våpen.

Et menneske kommer gående. En mann med en leyp. Han er meget gammel. Han går lett og ubesværet med den fjærende gang som kjenne tegner den som er hjemme i hei og mark.

Han står ved siden av meg. En høy, tynn mann, med så tindrende klarblå øyne som ingen annens, og et gjennomfuret værbitt ansikt. Et ansikt som er et landskap, og en historie.

Han forteller. Enkelt og lavmelt. Han dramatiserer ikke. Hans historie er hverdagens livsdrama. Om en hard og aldri avsluttet kamp for tilværelsen. Om slitet på en stenet jord og i en liten båt, som ga til livets udkomme, og lite mer enn det.

Vi skuer utover det solfylte, blått sølvskimrende hav. Han beretter om det urolige og voldsomme hav, som mer enn en gang truet med å ta ham til seg.

Han beklager seg ikke. Han har hatt et godt liv, sier han. Det er snart slutt nå.

Jeg spør.

– Har du bodd her hele ditt liv?

– Ikke ennå, svarer han.

Han var en fremmed. Jeg vet ikke hans navn. Men jeg er rikere nå enn før jeg møtte ham.

Et mirakel av en dag er nådd til den blå time. Timen da dag blir til natt, og himlens og havets lysblå og gråblå toner smelter sammen med kystrandens og fjellenes mørkere blå.

Timen da alt er blått, og alt er fred.